Ítróttar
Sosialurin
Nr. 72 • týsdagur • 11. apríl 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# HB skal til Letlands at spæla Intertoto

**Lutakastið til Intertoto-kappingina hjá UEFA lagaði seg soleiðis, at HB skal spæla ímóti FC Dinaburg úr Letlandi**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

HB skal í juni mánaði verða við í Intertoto-kappingini hjá UEFA. Hetta er tann minsta av teimum europeisku kappingunum, sum UEFA skipar fyri millum feløg.

Mánadagin var lutakast um, hvussu spælast skal í hesari kappingini, og HB fekk mótstøðulið úr Letlandi. Í nógvum londum er ikki enn gjørt av, hvørji feløg skulu spæla við í Intertoto, men í Letlandi er tað mest sum greitt, at FC Dinaburg skal spæla við, og teir verða mótstøðulið hjá HB.

FC Dinaburg er úr býnum Daugavpils har eysturi í landinum, og býurin liggur nær við markið til Hvítarusland. Tað búgva umleið 120.000 fólk í býnum, og felagið FC Dinaburg er seinastu átta árini endað sum nummar 4 í lettisku kappingini.

## Nøgdir við lutakastið

Heimasíðan hjá HB skrivar, at leiðslan í felagnum er rímiliga væl nøgt við lutakastið í gjár. Lettisku liðini eru vanliga ikki tey sterkastu, tá ið hugsað verður um tey eystureuropeisku londini, og í lettiskum samanhangi er FC Dinaburg ikki millum tey sterkastu liðini. Har plaga Skonto og Metalurgs at kappast um meistaraheitið.

Dystirnir hjá HB í Intertoto verða spældir í juni mánaði. Tann fyrri dysturin verður 17. ella 18. juni, og tann seinni verður eina viku seinni, tann 24. ella 25. juni.

Tað er ikki gjørt av, hvør fær heimavøll í fyrra dystinum.

## Royna at koma víðari

HB-málmaðurin Bárður Johannesen heldur, at lutakast var á góðari leið.

– Hetta er neyvan tað sterkasta liðið, sum vit hava møtt í europeiskari kapping, so kanska hava vit ein møguleika ímóti teimum. Vit skulu royna at koma víðari frá hesum umfarinum, tað kann í øllum førum vera málið hjá okkum, sigur hann.

Bárður Johannesen heldur, at uppgávurnar í europeiskum kappingum eru hugaligar, hóast spenningurin um hesar dystir ikki er so stórur sum fyrstu árini, tá ið føroyskur fótbóltur fór upp í kappingarnar hjá UEFA.

– Ferðirnar vísa seg altíð at vera sera góðar, og tað er eisini ein spennandi ítróttarliga avbjóðing av spæla Europa Cup. Nógvir á HB-liðnum eru ungir spælarar, sum ikki hava roynt nakað serligt av hesum áður, so tað verður ikki minst ein spennandi avbjóðing hjá teimum, sigur Bárður Johannesen.

HB-málmaðurin heldur eisini, at tað er ein fyrimunur, at dystirnir liggja mitt í kappingini og ikki í summarferiuni.

– Ofta hava teir europeisku dystirnir ligið mitt í summarferiuni her í Føroyum, og tí hava dystirnir órógvað feriuna nógv. Hesaferð eru dystirnir í juni mánaði, og tá eru vit mitt í tí heila, sigur hann.


*HB skal í juni mánaði spæla Intertoto-dystir ímóti liðið úr Letlandi, og HB-málmaðurin heldur, at HB skal royna at koma víðari frá fyrsta umfari*

## LÍF telist nú millum tey fremstu

1. DEILD
*Jóannes Hansen*

LÍF vann mánakvøldið útsetta dystin móti HB 2-0. Andreas Lava Olsen, sum var støðug hóttan móti HB verjuni, skoraði fyrra málið í 37. minutti. Hóast vinkulin var heilt spískur í vinstru, so eydnaðist tað at fáa bóltin framvið Tróndi Vatnhamar í HB málinum.

Fimm minuttir eftir steðgin økti Magni Høgnesen, sum júst var innkomin, um leiðsluna, eftir at Andreas Lava Olsen hevði lagt innfyri úr høgru og til handara stólpa.

Í 1. hálvleiki, tá ið HB hevði vindin ímóti, var torført at spæla, tí tað var so nógvur vindur. Eftir steðgin var mest sum stilli.

LÍF hevði fleiri møguleikar, og fram móti dystarenda hevði HB sín besta møguleika, men skotið hjá Bárði Mittelstein fór omanfyri málið hjá Rógva Ryggshamar.

Á HB liðnum vóru eitt nú Jan C. Dam, Poul Tummas Dam, Hallur Danielsen og Krzystof Popczynski.

Á LÍF liðnum vóru kend fótbóltsnøvn í Leirvík sum eitt nú Magnus Skoralíð, Fróði Joensen og Hans Fróði Hansen og Jákup Eli Olsen, sum áður hevur spælt við B68. Merkisvert var, at tríggir klaksvíkingar vóru millum teir fyrstu ellivu – Jan Joensen, Allan Joensen og Símun Waag Høgnesen. Átta minuttir fyri leiklok varð Marius Nystrøm Hansen skifur inn, og so vóru fýra klaksvíkingar á LÍF liðnum!

LÍF hevur seks stig eftir tvey tey fyrstu umførini. Tað hava AB, B71 og FSV04 eisini. HB hevur trý stig.

**LÍF-HB 2-0 (1-0)**
1-0: Andreas Lava Olsen 37.
2-0: Magni Høgnesen 50.

# FINNIÐ BÓLTIN

Saman við Atlantic Airways lutar Sosialurin í ár ikki færri enn 13 flogferðaseðlar á rutunetinum hjá Atlantic. Ein vinnari verður hvørt umfarið í Formula-deildini

Møguleikarnir fyri flogferðum úr Føroyum hava ongan tíð verið so stórir, sum teir verða tað í ár. Við fimm flogførum í støðugari flúgving eigur Atlantic Airways sín stóra lut í øktu valmøguleikunum, og nú kanst tú saman við Sosialinum og Atlantic verða partur í nøkrum av mongu fráferðunum.

Eftir hvørt umfarið í Formula-deildini verður ein mynd at síggja her í blaðnum, har vit hava »sletta« bóltin úr myndini. Uppgávan hjá lesaranum er so at gita, hvar hesin bólturin eigur at vera.

Við at senda SMS-boð á 1441 ber til hjá lesarunum at vera við í kappingini, har Atlantic Airways hevur eina flogferð tøka eftir annaðhvørt av teimum 27 umførunum í Formula-deildini.

Heldur tú, at bólturin er í teigi 1, skal teksturin í SMS-boðnum vera »hvar 1«. Soleiðis skal hvørt boðið bara innihalda orðið »hvar« og so nummarið á teiginum, har tú heldur bólturin eigur at vera.

*Kostnaðurin fyri at senda boðini er 5 krónur umframt vanligan SMS-takst.*

ATLANTIC AIRWAYS






***Hvar er bólturin?***
Hvar heldur tú, at bólturin er? Við at senda eini SMS-boð til 1441 kanst tú vera við í lutakastinum um eina ferð á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Skrivað hvar og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin vera.